## Ferrari var fremst

Spanski Fernando Alonso og brasilski Felipe Massa syrgdu fyri dupultsigri til Ferrari, tá fyrsta Grand Prix-kappkoyringin í Formel 1 var í Bahrain í gjár. Lewis Hamilton í McLaren var nummar trý, framman fyri Sebastian Vettel frá Red Bull, sum byrjaði fremst og leingi var á odda, men kortini ikki megnaði at halda fast um oddasessin og datt niður á fjórða plássið.



## Schumacher væl við

Størsti spenningurin undan kappkoyringini í Bahrain í gjár stóð um 41 ára gamla týskaran, Michael Schumacher, sum eftir trý ár frá motorítróttinum gjørdi »come-back« í einum bili hjá Mercedes. Men hóast hann hevur verið burtur frá Formel 1, stóð hann seg væl og kom á mál sum nummar seks. Sostatt fekk sjeyfaldi heimsmeistarin stig burtur úr kappingini.

### Fleyr-Mjølnir 3-0 (25-16, 25-19, 25-20):

# Fleyr tók bronsuna

**Fleyr, sum fyri góðum mánaði síðani var fullkomuliga avskrivað til toppin í Eik-liguni hjá kvinnum, kom sterkt aftur ímóti endanum og vann bronsuna – enntá frá Mjølnir, sum fyri einari viku síðani mist gullkjansin og nú einki heiðursmerki fekk**



Hilmar Jan Hansen



Leygardagin fekk Fleyr alt at rigga í »bronsufinaluni« ímóti Mjølnir, sum ongantíð veruliga kom inn í dystin

Mynd: Álvur Haraldsen

Tá kvinnurnar hjá Fleyr fyrst í februar mánaði á heimavølli taptu fyri Drátti, tóktist tað sum endin á øllum møguleikum hjá Fleyr at fáa nakað sum helst burturúr hesum kappingarárinum. Nú var gloppið ov stórt upp til tey plássini, har tað stuttliga hendi.

Men best sum alt var avskrivað, raknaði Fleyr við ímóti endanum og fór brádliga at vinna dystir. Í Trongisvági var tað fyrst TB, ið kendi sviðan av endurreista Fleyr-liðnum, ið endiliga fór at spæla frígjørt, nú alt trýstið var burturi. Burtur úr tí kom ein ordans endabrestur við fýra sigrum á rað.

Leygardagin gav tað so eisini ein vinning av sær, tí tann fjórði var ímóti Mjølnir, sum annars í allan vetur hevur verið liðið, ið sá út til at orka best at renna aftan á SÍ. Men nú avgerandi dystirnir skuldu spælast, var soðið ov tunt hjá Mjølnir, ið fyrst misti finalukjansin við at tapa fyri TB, og nú í allarsíðsta dystinum misti bronsukjansin eisini.

Av teimum trimum kvinnudystunum hetta síðsta umfarið, var hetta tann einasti, ið hevði ávirkan á nakað sum helst, tí her stóð bronsan upp á spæl. Vinnandi liðið fekk bronsu og tapandi liðið fekk fjórðaplássið. Undan dystinum var Mjølnir eitt stig framman fyri Fleyr.

### Alt riggaði bara

At tað kann gera nógv við eitt lið, at tað ikki spælir undir trýsti, gjørdist Fleyr sostatt besta dømi um, tí leygardagin var eingin slingur í valsinum. Tað sá út, sum bar alt til hjá liðnum, sum á pappírinum átti at verið eitt avgjørt topplið – við ikki færri enn fimm landsliðsspælarum…

Mjølnir fekk ongantíð fótin fyri seg, tí hóast Fleyr hevði nakrar servufeilir, gekk alt sum fótur í hosu. Allarflestu servurnar kom hart og væl yvirum og skaptu trupulleikar hjá mótstøðuliðnum, og haraftrat var álopsspælið varierað og gott, so Mjølnir hvørki á gólvinum ella í blokkinum megnaði at venda dystinum.

Og tá so Mjølnir royndi, vóru tær hjá Fleyr sera ídnar at fáa bóltarnar uppaftur, um tær ikki longu høvdu blokkað klaksvíkskvinnur frammi við netið. Gjøgnumgangandi spældi Fleyr tað besta, sum liðið hevur avrikað í vetur, og verður hesin tráðurin tikin upp, tá nýggja kappingin byrjar aftur, verður ikki stuttligt at vera fyri!

Í fyrsta settinum fylgdust liðini upp til 12-12, men so fór Fleyr avstað. Og liðið helt fram í øðrum setti, tá ein leiðsla varð vunnin beinanvegin og hildin allan vegin. Tað var heldur javnari í triðja setti, men framvegis ikki øðrvísi enn so, at Fleyr eisini vann tað trygt.

# Hans gevst sum venjari

**Komandi kappingarár skulu kvinnurnar hjá Fleyr hava nýggjan venjara, tí eftir fýra ár í sessinum fer Hans Mikkelsen at royna aðrar avbjóðingar – eisini í ítróttarheiminum**



Hilmar Jan Hansen



Hans Mikkelsen heldur, at tað er eitt gott Fleyr-lið, hann nú letur upp í hendurnar á komandi venjaranum hjá havnarkvinnunum, sum endaðu árið við at vinna bronsu

Mynd: Álvur Haraldsen

Dysturin ímóti Mjølnir leygardagin gjørdist tann seinasti hjá Hans Mikkelsen sum Fleyr-venjari í hesum umfarinum. Hann hevur vant kvinnurnar hjá Fleyr síðstu fýra árini, men hevur nú hug at royna aðrar avbjóðingar.

– Hetta hava verið fýra góð ár, har vit hava spælt okkum úr 1. deild upp í Eik-liguna og verið í einari steypafinalu, men nú haldi eg, at tað er klárt hjá onkrum øðrum at taka yvir. Tað verður eisini deiligt at sleppa undan at venja, nú tað hava verið fýra venjingarkvøld um vikuna hesi fýra árini, segði Hans eftir dystin ímóti Mjølnir leygardagin, sum tryggjaði honum og Fleyr-kvinnunum bronsuheiðursmerkini.

Tað var hann eisini nøgdur við, soleiðis sum kappingarárið hevur háttað seg:

– Sum tað endaði hjá okkum, kennist tað gott at standa við bronsuheiðursmerkjunum, tí um vit taka alt kappingarárið, hevur tað verið sera skuffandi, sigur fráfarandi venjarin, ið ikki minst man hugsa um, hvussu nær Fleyr var at koma í steypafinaluna hjá kvinnunum, men tvær ferðir tapti fyri Drátti og tí ikki rakk allan vegin.

– Nú veit eg ikki, hvussu liðið verður mannað næsta kappingarár, men eg rokni bara við, at sum heild verða tað tær somu, ið halda fram. Sum eg havi sagt fyrr, so er eingin ivi um dygdirnar á liðnum, tí tá Fleyr spælir væl, er tað eingin annar, ið spælir betur.

Hóast leikluturin sum venjari er liðugt spældur hesa ferð, merkir tað ikki, at Hans Mikkelsen púrasta sleppur ítróttinum. Hann fer bara at leggja seg eftir øðrum ítrótti í staðin:

– Eg eri knýttur at kvinnulandsliðnum í hondbólti sum fysiskur venjari, so har verður eitt sindur at gera komandi tíðina. So fari eg eisini at fáast meira við klintring í Coast-Zone North Atlantic, har vit eru nakrir, ið ætla okkum at fáa instruktørprógv innan fyri tað næsta árið.